| | TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>16. november 2006 | Blað nr.:<br>6771 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **16. november 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **182/06-197/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Inga Dahl
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg
Heri Olsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**185/06** **2006-0445**

**Bjarti Mohr hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt.

**186/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 16. november 2006:** Tikið til eftirtektar.

**187/06** **2006-0475**

**Víðkan av byggisamtyktini fyri havnaøkið á Langasandi í Kollafirði.**

Vinnufyritøkur hava víst nýggja havnaøkinum á Langasandi stóran áhuga.

Havnaøkið er um at vera fult útbygt, soleiðis at plássið hjá verandi fyritøkum at vaksa um virksemið er avmarkað, og einki øki er tøkt til nýggjar vinnumøguleikar.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at mæla býráðnum, um byggi-og býarskipanarnevndina, at víðka byggisamtyktina fyri havnaøkið, soleiðis at fyllast kann meira út eystur frá verandi havnaøki sambært kortið nr. 1, dagfest 6. februar 2006.

**Havnanevndin 13. februar 2006:** Samtykt at beina málið í kollfjarðarnevndina.

**Kollfjarðarnevndin 15. mai 2006:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá havnameistaranum og beinir málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært hjálagda kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Freistin at komm við mótmælum til ætlaðu broytingina var 19. september 2006.

Kommunan hevur móttikið eitt mótmæli. Hetta er frá Virgari Fagraklett í Kollafirði, sum rekur hummaraveiðu á økinum.

Hann hevur 3 hummaraloyvi og vísir á, at á leiðin inni við keiøkið og inni á botni heldur tann størsti hummarin til. Um keiøkið verður víðkað, verður hetta ónýtiligt at fiska hummara á og tískil verða møguleikarnir fyri at fiska kvotuna upp munandi verri.

Hann sigur víðari, at 3 hummaraloyvi svara til 7.500 kg., kiloprísurin er uml. 85 kr. og loyvini verða givin út fyri 10 ár á gangin. Hetta gervur eitt samlað virði uppá kr. 6.375.000,00.

Víðkanin av byggisamtyktini fyri havnaøkið á Langasandi gongur út til dýbdarkotu 20.

Tórshavnar Havn hevur, í øðrum sambandi, fingið at vita frá felagnum hummarabátar, at hummaraveiða bert fer fram á dýpi størri enn 20 m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við ætlaðu broytingina vísandi til, at ætlaða nýggja havnaøkið bert kemur út til dýbdarkotu 20, og at hummaraveiða bara fer fram á dýpi størri enn 20 m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**188/06** **2006-3283**

**Brúgvin um Sandá.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**189/06** **2003-2371**

**Søupláss til matvørur v.m. í Vágsbotni**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Plássið í Vágsbotni, ið sambært politiviðtøkuni § 34, 2. petti, verður nýtt til sølu av nýveiddum fiski, fugli o.t., lýkur ikki reinføriskrøv o.a., sum fylgja av matvørulógini. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur boðað kommununi frá, at um søluplássið skal góðkennast til sølu av matvørum, eigur tað at skipast sambært galdandi krøvum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir heilsu- og umhvørvisnevndini til at samtykkja, at álagt verður umsitingini at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássi, ið kann góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni til sølu av matvørum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Skitsuuppskot og kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. september 2005:** Nevndin ynskir at umsitingin setur seg í samband við partarnar í málinum, áðrenn støða verður tikið til skitsuuppskotið.

**Ískoyti:**
Málið er sent til hoyring hjá Heilsufrøðiliga starvsstovan og hjá Tórshavnar Havn. Málið er samstundis beint í ferðslunevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til viðmerkingar.

Heilsu- og umhvørvisdeildin ynskir at fáa byggi- og býarskipanarnevndina at taka støðu til um byggiloyvi til sølupláss í Vágsbotni kann veitast.

Málið verður við hesum lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Býararktiekturin mælir til at loyvi verður at byggja omanfyrinevndu sølupláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Nevndin tekur undir við at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Ískoyti:**
Við støði í viðmerkingum frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Tórshavnar havn leggur umsitingin eitt meira ítøkiligt uppskot til sølupláss í Vágsbotni fram á fundinum, sí mál 2003-2371/13.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at søkt verður hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni um loyvi til sølupláss fyri veiðu í Vágsbotni og at arbeitt verður víðari við ætlanini.

**Tekniska nevnd 9. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ferðslunevndin 21. februar 2006:** Nevndin tekur undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Umsókn viðv. søluplássi í Vágsbotni er sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni (HS) 8. mars 2006. Í brævi hin 2. juni 2006 kann HS geva tilsøgn til sølupláss í Vágsbotni, um niðanfyri nevndu treytir verða fylgdar:

- Týning av skaðadjórum. Rottukassar skulu plaserast fram við kaiøkinum.
- Vesifasilitetir, sum ikki eru almennir, skulu verða til sølufólkið.

Umsitingin mælir til, at vesifasilitetir verða gjørdir í húsinum hjá bátafelagnum. Ein nýggj kostnaðarmeting av søluplássinum fyriliggur (sí j. nr. 2003-2371/21).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 1,55 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at biðja umsitingina um sundurgreina uppskot um fígging.

**Broyting í tilmæli:**
Av tí mælt verður til at gera arbeiði í stigum, har fyrsta stig er teir fyrstu 8 yvirdekkaðu plintarnir, og toilett til sølufólkið, er tilmælið broytt soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta uml. kr. 1,0 mill. til gerð av søluplássi í Vágsbotni av konto fyri íløgur.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá byggi- og býarskipanarnevndini 30. oktober 2006.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**190/06** <u>**2001-2548**</u>

<u>**Viðv. vatnbyrging í Kollafirði**</u>.

Projektering av nevndu byrging er komin so væl áleiðis, at arbeiðið uppá atkomuveg v.m. er um at vera klárt at bjóða út.

Tíðar- og kostnaðarætlan er gjørd, og samlaður kostnaður pr. 24.10.2006 fyri fyribilsbyrging, atkomuveg, høvuðsbyrging og burturbeining av fyribilsbyrging er kr. 28.127.092.

Byrgingin kann takast í brúk á sumri 2009.

Av hesum er fyribilsbyrgingin mett til kr. 858.428, atkomuvegur niðan til byrgingina er mettur til kr. 8.153.952, og rør og kaðalføringar í nevnda vegi er mett til kr. 1.957.929.

Orsakað dálking av Botná í byggitíðini er neyðugt við eini fyribils byrging, ið verður løgd oman fyri arbeiðsøkið, og verður hetta fyrsta byggistig.

Vegna sera trupul vatnviðurskifti í Kollafirði verður Botná, sum ein neyðloysn, brúkt til drekkivatn í dag.

**Tilmæli:**
Leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla í fyrsta lagi til, at fyribils byrging og atkomuvegur verða framd í 2007 og at fíggja arbeiðið av íløgum fyri vatn. Í øðrum lagi verður mælt til einans at lata gera fyribils byrging í 2007 fíggjað av íløgum 2007.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum at lata gera fyribils byrging og atkomuveg álj. uml.. 11 mió. kr. at fíggja av íløgum í 2007 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.000.000 til fyribilsbyrging at fíggja av íløgum 2007.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**191/06** <u>**2006-0168**</u>

<u>**Brunasamtyktin**</u>

Brunasamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er ikki gjørd tey síðstu nógvu árini.

Sambært brunalógini eigur brunasamtyktin at sendast inn til Brunaumsjón Landsins 5. hvørt ár.

**Tilmæli:**
Sløkkiliðsstjórin mælir til at fáa løgfrøðingin at standa fyri at gera nýggja brunasamtykt fyri Tórshavnar kommunu.

**Brunanevndin 19. januar 2006:** Sløkkiliðsstjórin legði samtyktina fram.

Verður løgd fram aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Brunaumsjón landsins hevur havt samtyktina til viðmerkingar og hevur ynskt nakrar broytingar.

**Brunanevndin 12. oktober 2006:** Samtykt at senda málið í fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Kunnað var um málið sum verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 16. november 2006:** Einmælt samtykt.

**192/06** **<u>2001-1587</u>**

**<u>Sankta Frants - nýbygging av smábarnaskúla</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Katólska kirkjan, fransiskanarsystrarnar, fóru undir at byggja kirkju, kleystur, skúla og barnagarð í 1932. H.C.W. Tórgarð, arkitektur gjørdi tekningarnar, og skúlin varð vígdur í 1933.

Í 1953 varð skúlin útbygdur, bæði við fimleikahøll og fleiri skúlastovum, í seksti- og sjeytiárunum varð skúlin aftur víðkaður.

Bygningurin er bygdur sum timburbygningur frá 1 hædd til 3 hæddir. Ein partur hevur kjallara.

Skúlin er ein tveysporaður skúli og hevur í dag 350 næmingar, og 40 starvsfólk arbeiða á skúlanum.

**Grundøki:**
Matr. nr. 779 f, stødd 4846 fermetrar.
Verandi ábygging 1246,00 fermetrar ábygging 0,26

Verandi nýtsluøki 3300,85 fermetrar nettonýtslustig 0,68

Sambært ásetingum fyri A1 og D3 grundumráði, ið skúlin liggur í, má byggistigið ikki fara upp um 0,3, og nettonýtslustig ikki fara upp um 0,3.

**Verandi støða**
Bygningurin hevur stórar trupulleikar við plásstroti, brunatrygd og arbeiðsumhvørvi.

**Útbyggja skúlan**
Í norðara skúlagarði verða bygdar 4 skúlastovur við tilhoyrandi felagsrúmum, 407 m². Bygningurin verður í einari hædd.

Við tað at økið verður tikið frá verandi skúlagarði, má víðkast um skúlagarðin við øki frá Fransiskanarsystrunum.

Kostnaðarmeting 407 m² x 16.000= kr. 6.512.000,00 uttan MVG. Útbyggingin av skúlanum nøktar tørvin fyri skúlastovum til smærru flokkarnar, og byggjast kann uttan at órógva skúlagongdina munandi.

Neyðugt verður við undantaksloyvi fyri nettonýtslustigið og góðkenning frá granna, Skógrøkt landsins.

**Verandi skúlabygningur**:
Tað verður neyðugt at brunatryggja verandi bygning, og at dagføra VVS, el-skipanina og ventilatiónskipanina.

Hesi arbeiði kunnu gerast stigvís. Rúmsháttari verður í gamla skúlanum, um yngru næmingarnir flyta í nýggja skúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mæla til at skúlin verður útbygdur við 4 skúlastovum, og at málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina, har søkt verður um loyvi at byggja í norðara skúlagarði.

**Mentamálanevndin 26. februar 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og deildarleiðaranum.

Eisini samtykt at kanna møguleikan at ogna/leiga økið eystanfyri, norðanfyri og vestanfyri nýbygningin, og at leggja málið fyri aftur mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá yvirhøvur at útbyggja Sankta Frans skúla vísandi til:

**at** alt ov nógv er bygt á økið sum er.
**at** ferðsluviðurskiftini í økinum eru út av lagi vánalig.

**at** nýggi smábarnaskúlin kemur alt ov tætt at kirkjuøkið og alt ov tætt at skógfriðaðum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. mars 2003:** Málið varð framlagt, umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari sambært samtyktini frá BB 24. mars 2003.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til verkætlan, har ein nýbygningur verður bygdur á sjálstøðugari matr., sum verður fingin til vega eftir fylgjandi leisti:

Sambært fyribils kanningum, skal býtið av matr. skipast eftir hesum leisti.

| | |
|---|---|
| Matr.nr 779a skal lata | 890 m² |
| Matr.nr.779b skal lata | 20 m² |
| Samlað gevur hetta: | 1710 m² |

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:

| | |
|---|---|
| Byggistig: | 0,25 |
| Nettonýtslustig: | 0,30 |

Roknað verður við nýbygging uppá uml. 400 m².

Sambært hesum uppskoti er hædd tikin fyri, at skúlabygningurin er fluttur niðan á matr. nr. 779b, soleiðis at hann ikki liggur so tætt upp at kirkjuni.

Kirkjan er ein sera vakur bygningur og eigur at sleppa at standa so eksponeraður sum til ber.

Henda ætlan innber, at matr. nr. 779b søkir um at fáa sundurbýtt ognina har latið verður uml. 820 m² til ætlanina saman við ein part 890 m² frá matr.nr. 779a.

Hesir báðir partarnir skulu leggjast saman til ein sjálvstøðuðan matrikul uppá uml. 1710 m² við atkomurætt yvir matr.nr. 779f upp á 4 m breiðan vegaskap. Tekning j. nr. 200101587-21.

Skeyti upp á matr. eru fingin til vega og vera kannað fyri servituttir o.a. Eftir er eisini at kanna skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanina, so arbeiðast kann víðari við málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
22. mars 2005:

Umsókn, dagfest 4. februar 2004, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-35.

Náttúrufriðingarnevndin avgjørdi ikki at viðmæla umsóknini, sí j. nr. 200101587-34.

Nýggj umsókn, dagfest 24. juli 2003, var send náttúrufriðingarnevndini um at byggja skúla samb. hjáløgdu tekning, sí j. nr. 200101587-39.

Yvirfriðingarnevndin viðmælti umsóknini, sí j. nr. 200101587-48.

Verður skúlin á uml. 430 m² bygdur í skúlagarðinum, har skýlini eru, sí kort 1, skulu uml. 420 m² frábýtast matr. nr. 779a, sí kort 2.

Ætlanin er at frábýta 810 m² frá 779a og 700m² frá 779b til grønt spæliøki, sí kort 2.

Umrøddu matriklar liggja í D3, har ásetingarnar um bygging eru:
Byggistig : 0,25
Nettonýtslustig: 0,30

**Grundøki:**
Matr. nr. 779f, stødd 4846 fermetrar.

| | | |
|---|---|---|
| Verandi ábygging | 1246,00 fermetrar | ábygging 0,26 |
| Verandi nýtsluøki | 3300,85 fermetrar | nettonýtslustig 0,68 |

Um 1930 m² verða lagdir afturat 779f verður byggistigið: 1676 : 6776 = 0,25. Netto-nýtslustigið verður: 3730,85 : 6776 = 0,55.

Núverandi vídd á matr. nr. 779a er 4035 m. Frábýtast skulu 1230 m², soleiðis at samlaða víddin verður 2805 m². Á matr.nr. 779a stendur bygningur sum er bústaður hjá franciskanarasystrunum, 315 m² til víddar, umframt katólska kirkjan, sum er 176 m² til víddar.

Núverandi vídd á matr. nr. 779b er 3024 m². Frábýtast skulu 700 m², soleiðis at samlaða víddirn verður 2324 m². Á matr. nr. 779a standa eini sethús 110 m² til víddar, umframt ein partur av katólsku kirkjuni.

Viðmerkjast skal, at katólska kirkjan stendur á bæði matr. nr. 779a og matr. nr. 779b, og at tað var ein treyt frá kommununi, at markið var broytt, soleiðis at kirkjan kom at standa á einum matr. nr. Henda broyting er ongantíð gjørd.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at viðmæla, at Tórshavnar kommuna fer undir at keypa nevndu fermetrar og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við atliti til undanfarna samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005 mett, at neyðugt er at senda málið til grannahoyringar vísandi til, at orsøkin fyri, at kommunan fer undir at keypa lendið, er at kommunan umhugsar at byggja meira á økinum, og at ein slík bygging vil krevja frávik frá ásetingunum um nettonýtslustig fyri økið.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini til at senda málið til grannahoyringar fyri at hoyra grannarnar um ætlaninar um bygging, sum treytar frávik til krøvini um nettonýtslustig fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2005:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Fíggjarnevndin 13. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við samtyktini frá byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2005.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar, viðmerkingarnar verða viðgjørdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir ætlanina, so at arbeiðast kann víðari við málinum.

Meðan málið varð viðgjørt, var Magni ikki á fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna ætlanina, og at atlit verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum.

**Ískoyti:**
**Nýggjur smábarnaskúli við Sankta Frans skúla**.
Ætlanin er at byggja nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúla.

Nýggi bygningurin verður skipaður sum ein sjálvstøðugur bygningur, sum verður bygdur leysur av gamla skúlanum.

Fyri at keypa lendið er neyðugt at gera eitt skitsuuppskot.

Biðið verður um kr. 500.000,00 til liðugtgerð av byggiskrá og skitsuprojekt. Av serligum orsøkum er byggiskráin ikki gjørd liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta peningin kr. 500.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at játta kr. 350.000,00 av íløguætlanini á skúlaøkinum til at gera byggiskrá og skitsuuppskot og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina at fáa greiðu á, hvat byggiskrá og skitsuprojekt skal gerast fyri, vísandi til samtykt 26. februar 2003 um 4 skúlastovur og tilmæli um nýggjan skúla til forskúla, 1. flokk og frítíðarskúla til forskúlan.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 13. juni 2005, at atlit skulu verða tikin til viðmerkingarnar frá grannum um at útvega fleiri bilstøðlar á skúlaøkinum enn teir 9 bilstøðlarnar, sum er minstakrav til bilstøðlar sambært byggisamtyktini til ein bygning á 430 m².

Umsitingin hevur arbeitt víðari við arbeiðsskrá og skitsuuppskoti av nýbygningi. Við atliti til samtyktina 13. juni 2005 metir arbeiðsbólkurin og býararkitekturin tað verða sera torført at liva upp til nevndu samtykt.

Sambært byggisamtyktini skal áður nevndi nýbygningur útvega 9 bilstøðlar, hesum kann takast hædd fyri við at taka av verandi skúlagarði, men tað kann ikki metast ráðiligt at taka meira enn hetta av skúlagarðinum, vísandi til at umstøðurnar frammanundan eru trongar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. desember 2005:** Nevndin samtykti at arbeiðast skal víðari við málinum við 9 bilstøðlum.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og dispositiónsuppskot verða framløgd.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Brot úr byggiskránni:**
"Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Skt. Frans skúla. Nevndin er mannað av:

| | |
|---|---|
| Unnie Justinussen | Tórshavnar kommuna/tekniska fyrisiting |
| Høgni Joensen | Tórshavnar kommuna/trivnaðarfyrisitingin |
| Selmar Jacobsen | Skúlastjóri/Skt. Frans skúli |

Skrivari hjá nevndini er Rúni Abrahamsen MAP Arkitektar.

Tað hava verið gjørdar fleiri ætlanir at útbyggja Skt. Frans skúla, men lítið annað er hent enn onkrar hissini umvælingar.

Ein av orsøkunum at einki enn er hent, kann vera, at einki byggilendi er til skúlan. Onkur ætlan hevur verið at byggja niðaneftir móti viðalund og kleystrinum, men hesar eru steðgaðar av nátúrufriðingarnevnd og skógrøkt landsins. Fransiskanararsystrarnar eiga eisini økið aftan yri skúrarnar við fimleikahøllirnar.

Kommunan hevur sent umsóknir til náttúrufriðingarnevndina, sum til síðst góðkendi eitt uppskot uppá 430 fermetrar í einari hædd, bygt har skúrarnir standa í dag. Náttúrufriðingarnevndin skal somuleiðis hava uppskotið til bygging til góðkenningar.

Hetta hevur verið útgangsstøðið hjá bygginevndini."

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir til, at bygginevndin arbeiðir víðari við byggiskránni, har kostnaðurin verður kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgv.

Skúlastýrið í Sankta Frans skúla hevur biðið um fund við mentamálanevndina um ætlanirnar hjá nevndini um byggjan av nýggjum smábarnaskúla til forskúla og 1. flokk.

**Mentamálanevndin 28. mars 2006:** Mentamálanevndin møtti á fundi í Sankta Frans skúla, har nevndin hevði fund saman við skúlastýrinum.

Samtykt at viðgera málið aftur á næsta fundi í mentamálanevndini, sum verður týsdagin 4. apríl 2006.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentamálaleiðaranum at byggja skúlabygning fyri kr. 20.000,00 m² við MVG og innbúgvi, tilsamans kr. 9 mió.

Nevndin samtykti eisini at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at bjóða arbeiðið út í umvendari licitatión og at fíggja arbeiðið av íløgum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og samtykt at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini og býararkitektinum:**
**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna setti í november 2005 eina bygginevnd at fyrireika nýggjan barnaskúla við Sankta Frans skúla.

Nevndin kom við byggiskrá og uppskoti í mars 2006. Byggiskrá og uppskot var lagt fyri mentamálanevndina til støðutakan. Nevndin gjørdi somuleiðis vart við, at byggingin var viðbrekin, tí partur av grundøkinum er ogn hjá fransiskanarsystrunum, sum skuldu góðkenna uppskotið. Tí var uppskotið kanska dýrari enn líknandi bygging aðrastaðni. Somuleiðis hevur umhvørvið, skúlin og lendi ein dýrkandi leiklut.

Mentamálanevndin avgjørdi á fundi 4. apríl 2006 at senda verkætlanina út í øvutari lisitatión.

Støðan á arbeiðsmarknaðinum er í løtuni ikki til fyrimunar fyri hesum útbjóðingarhátti. Arbeiðstakarar hava ovmikið at gera. Hetta sæst ikki einans á teimum lisitatiónum, sum hava verið í seinastuni, men eisini tá ið arbeiðstakarar ítøkiliga verða spurdir, um áhugi er at bjóða upp á arbeiði eftir hesum leisti.

Av tí at arbeiðstakarar í Tórshavn ikki hava avvíst at bjóða upp á arbeiðið, men hava víst á, at hátturin er arbeiðskrevjandi, mælir bygginevndin og býararkitekturin til at broyta útbjóðingarháttin til høvuðsarbeiðstøku eftir prekvalifikatión, har tekniska umsitingin hevur møguleika at meta um hvønn einstakan arbeiðstakara við atliti at førleika, manning og fíggjarligum viðurskiftum.

Undanførleikametingin gevur grundarlag at bjóða arbeiðið út millum skikkaðar arbeiðstakarar antin í lisitatión, í undirhondsboði ella við samráðing alt eftir, hvussu nógvir arbeiðstakarar uppfylla minstukrøvini.

Ætlanin við undanførleikametingini er at staðfesta ítøkiligt, um áhugin hjá arbeiðstakaranum at bjóða er sakliga undirbygdur.

Til undanførleikametingina kann verða biðið um hesar upplýsingar:

1. Almenn lýsing av arbeiðstakaranum, so metast kann um kravda minstuorku bæði á tí fíggjarliga og á tí tekniska økinum.
2. Upplýsingar um fyriskipan og bygnaðin hjá fyritøkuni, undir hesum møguligt samband við móðurfelag.

3. Váttan ella trúnaðarváttan, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
4. Avrit av viðkomandi vinnulívstryggingum.
5. Upplýsingar um eginogn og javna í roknskapi, tá ið søkt verður saman við einari váttan av samlaðu søluni hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
6. Váttan um árliga miðaltalið av fólki, sum starvast í fyritøkuni.
7. Ummæli frá líknandi uppgávum.
8. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkunum, ið verða knýtt at uppgávuni.
9. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.

**Tilmæli frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum:**
Mælt verður til at taka undir við tilráðingini frá bygginevndini og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 1. november 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu beinanvegin.

**Býráðið 16. november 2006:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Hilduri Eyðunsdóttir um at taka undir við mentamálanevndini tann 1. november 2006, ið fall við 1 atkvøðu fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddi: Hildur Eyðunsdóttir

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Leivur Hansen, Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**193/06** **<u>2005-3141</u>**

**<u>Bussleiðin – ókeypis koyring í eitt royndarár</u>.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við endurskoðanina av bussleiðini eru m.a. ynski um at viðgera spurningin um, hvørt tað kundi verið ein gongd leið at innført ókeypis busskoyring sum lið í

strembanini eftir at økja um nýtsluna av bussunum og samstundis at flyta nakað av privatbilferðsluni yvir á kollektivferðsluna.

Heldur enn at víðka verandi bussleið, kundi verði sett í gildi ókeypis busskoyring í fyribils eitt ella tvey ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Soleiðis hevði borið til at eggjað borgarunum til at brúka bussarnar, og ikki minst at ala børnini til á ein náttúrligan hátt at brúka bussarnar heldur enn at verða koyrd til og frá skúla, ítrótti, frítíðarvirksemi o. ø.

Ókeypis busskoyring fer at elva fólki til at brúka bussleiðina meira. Ein slík tilgongd kundi verið við til at minka um bilatalið í býnum, og um ta alsamt veksandi ferðsluna í kommununi. Færri tal av bilum verður í býnum um dagarnar, hetta hevði bøtt um parkeringsmøguleikarnar.

Um fyrimunir og royndir aðrastaðni verður víst til frágreiðing frá Teknologirådet í Danmark, um "Gratis offentlig transport", har sagt verður m.a.:

*"Der er bred enighed blandt sagkyndige om, at der er samfundsøkonomiske fordele at hente ved at flytte en del af privatbilismen over i offentlig transport. Enkelte vurderer endda at samfundet som helhed vil tjene på at gøre den offentlige transport gratis. Ikke i form af et direkte konkret afkast, men udfra en helhedsorienteret og langsigtet samfundsøkonomisk vurdering, hvor de manglende billetindtægter opvejes af en reduktion af udgifter på andre områder.*

*Ved at reducere privatbilismen reduceres nemlig samtidig de negative afledte effekter og dermed også udgifterne til dem. Det er effekter som ulykker, luftforurening, CO2-udslip/klimaeffekt, ressourceforbrug (olie), støj, trængsel, udbygning og vedligeholdelse af infrastruktur."*

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Í eini roynd at tálma støðugt vaksandi ferðslutrýstinum í kommununi og at fáa økt um nýtsluna av Bussleiðini mælir ein meiriluti**,** Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, býráðnum um fíggjarnevndina til, at verandi busskoyring verður ókeypis fyribils í eitt ár sum royndartíð, galdandi frá 1. januar 2007. Meirkostnaðurin fyri hesa tænastu verður uml. 3,5 mió. kr. og verður heitt á fíggjarnendina um at taka hetta upp í sambandi við 2. viðgerð av uppskotinum um fíggjarætlan fyri 2007.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen, tekur ikki støðu til málið vísandi til at einki tilmæli er frá umsitingini og at fíggjarætlanin innan tekniska økið fyri 2007 longu er samtykt av teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Umrøtt og verður tikið uppaftur í.s.v. 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2007.

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 16. november 2006:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**194/06** **2006-0162**

**Uppskot til ársfíggjarætlan 2007 hjá Tórshavnar kommunu.**

Býráðið hevur tann 21. sept. 2006, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2007, ið javnvigar við 530 mió. kr.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2007, sum faknevndirnar hava viðgjørt.

**1. viðgerð:**
**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, tilskilar sær rætt til at koma við broytingaruppskoti við 2. viðgerð.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Einmælt samtykt við 1. viðgerð.

Minnilutin tilskilar sær rætt til at koma við broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**2. viðgerð:**
**Broytingar - hækkingar:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 18 | Bussleiðin | kr. | 3.500.000 |
| - | 37 | Stadion | - | 400.000 |
| - | 39 | Ymsir studningar | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Gluggahyljar, akvariið | - | 400.000 |
| | | Ferðavinnan í Nólsoy | - | 300.000 |
| - | 63 | KT-verkætlan | - | 2.000.000 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum | - | 400.000 |
| | | | kr. | 7.000.000 |
| - | 89 | Skattainntøkur | - | 7.000.000 |
| | | | kr. | 0 |

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Eini meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at hækka fíggjarætlanina við tkr. 7.000 til rakstur og at hækka inntøkuna samsvarandi umframt tkr. 50.000 til íløgur, sum verða fíggjaðar av tøkum peningi.

Meirilutin samtykti eisini at mæla býráðnum til at áseta skattaprosentið til 19,75% og barnafrádráttin til kr. 5.000,00.

Ein minniluti, Jan Christinasen, og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Útreiðslur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 19.394.000 |
| - | 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 7.986.000 |
| - | 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 14.413.000 |
| - | 04 | EDV-útreiðslur | - | 4.987.000 |
| - | 05 | Skattakærunevndin | - | 1.520.000 |
| | | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **48.300.000** |
| | | | | |
| Konto | 11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 17.528.000 |
| - | 12 | Umhvørvismál | - | 1.439.000 |
| - | 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13.181.000 |
| - | 15 | Renovatión | - | 15.805.000 |
| - | 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 17.892.000 |
| - | 18 | Bussleiðin | - | 11.591.000 |
| - | 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 9.063.000 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 10.400.000 |
| | | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **96.899.000** |
| | | | | |
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 100.000 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 449.000 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 600.000 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 380.000 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 1.536.000 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.076.000 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 3.315.000 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.189.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 2.940.000 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.233.000 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.163.000 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.934.000 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.474.000 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 3.698.000 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **39.087.000** |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 500.000 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.215.000 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.572.000 |
| - | 37 | Stadion | - | 3.980.000 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 7.313.000 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.750.000 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **27.330.000** |
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 18.010.000 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.305.000 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 325.000 |
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 9.250.000 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 555.000 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 555.000 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| | | Dagtilhaldið í Kollafirði | - | 0 |
| | | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **33.000.000** |
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 8.129.000 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.339.000 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 4.459.000 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.275.000 |
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.316.000 |
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.439.000 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.275.000 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 1.977.000 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.439.000 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.522.000 |
| - | 55 | Útibarnagarðurin Túgvan | - | 0 |
| - | 56 | Útibarnagarðurin Spírin | - | 0 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 3.584.000 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.016.000 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.483.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.272.000 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 2.835.000 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 3.098.000 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 2.325.000 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 5.603.000 |
| - | 568 | Dagstovnurin á Velbastað | - | 2.599.000 |
| - | 569 | Dagstovnurin Leikalundin | - | 1.279.000 |
| - | 57 | Frítíðarskúlin | - | 8.132.000 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 2.852.000 |
| - | 581 | Útistovan á Hvítanesi | - | 0 |
| - | 582 | Barnagarðurin í Ovarugøtu | - | 0 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 855.000 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.109.000 |
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.558.000 |
| - | 586 | Stuðulstiltakið í bridgehúsinum | - | 0 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.230.000 |
| - | 588 | Margarinfabrikkin | - | 2.581.000 |
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.016.000 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 18.286.000 |
| | | Børn og ung | - | 20.370.000 |
| | | Økt barnatal vegna umleggingar | - | 2.000.000 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **122.253.000** |
| | | | | |
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 8.565.000 |
| - | 81 | Sethús kommununnar | - | 1.000.000 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 38.000.000 |
| | 63 | Útveganir | - | 5.500.000 |
| | 68 | Útskiftan/útvegan av amboðum | - | 6.500.000 |
| | | Summararbeiði hjá skúlaungdómi- | - | 2.000.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **61.565.000** |
| | | | | |
| Konto | 66 | Reguleringskonto | kr. | 3.000.000 |
| | | **Rakstararútreiðslur íalt** | **kr.** | **431.434.000** |
| | | | | |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 150.000.000 |
| | | Smábátahavn | - | 5.000.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **586.434.000** |
| | | | | |
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 1.403.000 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 2.296.000 |
| | | **Lánsgjøld og grunnar** | **kr.** | **3.699.000** |
| | | | | |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **590.133.000** |

**<u>Inntøkur</u>:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 1.000.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000.000 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 536.133.000 |
| | | At fíggja við tøkum peningi | - | 50.000.000 |
| | | **Inntøkur íalt** | **kr.** | **590.133.000** |

**Býráðið 16. november 2006:** Fyrst varð atkvøtt um hesi tilmæli frá minnilutanum:

**at** konto 18 - Bussleiðin - hevur sama kostnað sum í 2006
**at** konto 90 - Íløgur -verður 105 mió.
**at** seta á stovn grunn til byggjan av nýggjum musikkskúla, tá búskaparstøðan í landinum ikki er so yvirupphitað, við 23,6 mió.
**at** lækka skattaprosentið við 1% til 18,75
**at** hækka barnafrádrátttin við 500 kr. til 5.500 kr.

Henda broyting vil hava við sær:

**<u>Útreiðslur</u>:**

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | kr. | 427.934.000 |
| Íløgur og musikkskúlagrunnur | - | 128.600.000 |
| Lánsgjøld og grunnar | - | 3.699.000 |
| **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **560.233.000** |

**<u>Inntøkur</u>:**

| | | |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur | kr. | 1.000.000 |
| Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000.000 |
| Skattainntøka | - | 506.233.000 |
| At fíggja við tøkum peningi | - | 50.000.000 |
| **Inntøkur í alt** | **kr.** | **560.233.000** |

ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Sjúrður Olsen, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Nú fór Marin Katrina Frýdal**

**195/06** **<u>2006-2914</u>**

**<u>Ársfíggjarætlan 2007 fyri Tórshavnar havn</u>**

**1. viðgerð.**
**Havnanevndin 25. september 2006:** Samtykt fíggjarætlanina við 1. viðgerð, sum javnvigar við kr. 62.106.000,00, og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið við 1. viðgerð.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**2. viðgerð:**
**Havnanevndin 6. november 2006:** Samtykt fíggjarætlanina, ið javnvigar við 62.106.000,00 við 2. viðgerð, og at senda hana til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til við 2. viðgerð at góðkenna uppskotið, sum javnvigar við 62.106.000,00.

**Býráðið 16. november 2006:** Einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Nú kom Marin Katrina Frýdal**

**196/06** **2005-0034**

**Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2006, flytingar millum konti/eykajáttan.**

Í fíggjarætlanini fyri 2006 blivu 25. mió settar av til íløgur, men nú ársendi nærkast sæst, nú arbeiðini eru um at vera liðug, at kostnaðurin verður áleið kr. 27.450.000.

Samlað hevur býráðið góðkent sáttmálar til íløgur íroknað kostnað fyri eftirlit og projektering, fyri kr. 28.450.000 til samanbinding av bryggjum í Kollafirði, útfylling til tangar á Viðarnesi, projektering Oyrareingir, modelroynd av bátahavn í Álakeri og BIP.

Til ber at fíggja meirnýtsluna til íløgur við minni nýtslu av konto fyri umvæling av húsum og konto fyri umsiting av brúgvum og vegum.

Havnameistarin vísir á, at sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað, og mælir til:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **at** | hækka játtan til íløgur við | kr. | 2.450.000,00 |
| **at** | lækka játtan til umvæling av húsum | - | 1.450.000,00 |
| **at** | lækka játan til umvæling bryggjur | - | 1.000.000,00 |

**Havnanevndin 6. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **at** | hækka játtnina til íløgur við | kr. | 2.450.000,00 |
| **at** | lækka játtan til umvæling av húsum | - | 1.450.000,00 |
| **at** | lækka játtan til umvæling av bryggjur | - | 1.000.000,00 |

**Fíggjarnevndin 13. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 16. november 2006:** Einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**197/06** **2005-1538**

**Fíggjarætlan 2006- eykajáttan.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

a. Við árslok 2005 vóru tilsamans 83.042 tkr. fluttar fram sum ikki brúkt játtan. Broytingin er rakstrarførd undir serligum upphæddum í roknskapinum 2005 og sett upp undir eginognini. Upphæddin kann sundurgreinast soleiðis:

**Deildir undir blokkskipanini – sí granskoðaraprotokoll síða 212, pkt. 5.2**

| **Endamál** | **Hækking á konto** | | **Upphædd** |
| --- | --- | --- | --- |
| Vegir og gøtur | 11 | kr. | -2.378.000 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | 18.000 |
| Brennistøðin | 15 | - | 2.634.000 |
| Asfalt, ferðsla o.a. | 16 | - | -4.428.000 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 2.670.000 |
| Hests skúli | 20 | - | 174.000 |
| Nólsoyar skúli | 21 | - | -164.000 |
| Velbastaðar skúli | 22 | - | -84.000 |
| Kaldbaks skúli | 23 | - | 68.000 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | -106.000 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 665.000 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 237.000 |
| Eysturskúlin | 27 | - | 301.000 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 273.000 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | -9.000 |
| Argja skúli | 30 | - | -5.000 |
| Býarsavnið | 34 | - | 272.000 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 328.000 |
| Svimjihøllin | 36 | - | -1.031.000 |
| Frílendisdeildin | 38 | - | -1.082.000 |
| Heilsmál | 41 | - | 299.000 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 539.000 |
| Frítíðarskúli 2. flokk | 59 | - | 1.171.000 |
| Gamla Havnin | 60 | - | 303.000 |
| Nýútveganir | 63 | - | 2.598.000 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 4.787.000 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | 4.455.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sethús | 81 | - | 717.000 |
| Onnur hús | 82 | - | -4.312.000 |
| Reguleringskonto | 66 | - | 3.914.000 |
| Íløgur | 90 | - | 66.344.000 |
| Barnaansing | | - | 3.874.000 |
| **Framfluttar játtanir íalt frá 2005** | | **kr.** | **83.042.000** |

**b. Eykajáttanir í 2006 av reguleringskonto:**

| | | |
|---|---|---|
| Royndarhúsið | kr. | 40.000 |
| Sakarmál KJ-smíð | - | 29.000 |
| Jólabýur | - | 200.000 |
| Beinkir | - | 195.000 |
| Veðurstøð | - | 150.000 |
| WC-vognar | - | 126.000 |
| Undirvísingarportalur | - | 200.000 |
| Hegn í Nólsoy | - | 375.000 |
| Grót í Nólsoy | - | 265.000 |
| Eftirlønir | - | 600.000 |
| Kirkjugarður í Koltri | - | 43.000 |
| Sandur á Malarenda | - | 70.000 |
| Velbastaðar skúli | - | 84.000 |
| Svimjihøllin | - | 807.000 |
| Hvíldarheimið Naina | - | 506.000 |
| **Játtað av reguleringskonto íalt** | **kr.** | **3.690.000** |

**Býráðið 16. november 2006:** Eimælt samtykt við 1. viðgerð.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Inga Dahl | Beate L. Samuelsen |

| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**16. november 2006** | Blað nr.: **6797** |
| | | Formansins merki: |

Sjúrður Olsen

Høgni Mikkelsen

Jan Christiansen

Heðin Mortensen